BP letur kanningar-arbeiði út

Victoria Oilfield Development gongur á odda í einum samstarvi, ið hevur fingið álagt at útføra eina longda kanning av einum brunni í Schiehallion-økinum vestan fyri Hetland

Aberdeen: Tvey onnur feløg eru í samstarvinum saman við Victoria Oilfield Development. Tey eru Diamond Offshore og Halliburton. Hesi tvey feløg fara fyrst at bora ein royndarbrunn frá flótandi boripallinum »Henry Goodrich«, sum BP hevur [illegible] teimum ókeypis at nýta [illegible] seinnu helvt av februar [illegible] at Victoria Oilfield Development var [illegible] at bjóða upp á royndirnar í Schiehallion. Hildið var tá, at felagið, ið hevur høvuðsstað í Houston í Texas, fór at nýta eitt av sínum egnu skipum »Ocean Guardian«, um so var, at royndirnar skuldu gerast í einum brunni, ið longu var boraður. Hetta hevur seinni víst seg ikki at halda, tí tey trý feløgini í samstarvinum skulu bora nýggjan brunn, og »Ocean Guardian« er ikki tøk í løtuni.

Sum áður nevnt, so verður tað »Henry Goodrich«, ið um stutta tíð skal seta á at bora og eftir ætlan skal fyrsta oljan renna um mánaðarskiftið [illegible]. Henda framleiðslu [illegible] ið miðar eftir at meta hvørt tað er møguligt at fáa [illegible] — skal ganga í 60 dagar og oljan verður pumpa í eitt tangaskip.

Bernie Morrison, ið er ein av stjórunum hjá Victoria Oilfield Development í Aberdeen, sigur at felagið í løtuni leitar eftir einum hóskandi tangaskipi. Allarhelst fer tangaskipið at koma úr Noregi, tí serliga Statoil hevur nógv tangaskip við teirri positions-tøknifrøði, ið krevst, tá skip skulu haldast støðug.

Borroyndirnar í Schiehallion-økinum vera triðju ferð

Birgir Christiansen

ABERDEEN

Ein av mest framkomnu boripallunum í heiminum "Ocean Explorer" borar her eftir olju fáa kilometrar frá føroyska fiskimarkinum. Mynd BP

Victoria Oilfield Development ger slíkt arbeiði fyri BP. Victoria Oilfield Development framdi eisini kanningararbeiði í Foinaven-økinum vestan fyri Hetland og í Mungo-økinum í Norðsjónum.

Harumframt hevur Victoria Oilfield Development mett um møguleikarnar at nýta flótandi framleiðsluskipanir í veldiga Clair-økinum, ið var fyrsta oljuøkið, menn komu fram á vestan fyri Hetland í 1977.

Havn á Hálandinum er »áhugaverd«

Møguligt er, at John Wood Group úr Aberdeen fer at seta á stovn eina framkomna veitingarmiðstøð í Scrabster, so at felagið betri verður ført fyri at veita teimum oljufeløgum tænastu, ið leita eftir olju vestan fyri Hetland

Aberdeen: John Wood Group hevur skrivað til havnastýrið og tekur felagið undir við ætlanunum hjá havnastýrinum um at seta á stovn eina oljumiðstøð í Scrabster.

Ein sendinevnd frá John Wood Group hevur longu vitjað havnina, har ætlanir eru at fara undir eina 200 milliónir krónur stóra ætlan at dýpa havnina munandi, so at skip, ið veita oljufeløgum tænastur, sleppa betur til.

Havnastýrið í Scrabster er evarfegið um áhugan frá John Wood Group og [illegible] nevniliga havnastýrið, ið nakað herfyri almannakunngjørdi úrslitini av eini kanning, ið viðgjørdi hvørjar fyrimunir Scrabster kundi vænta sær av oljuvinnuni.

Ein talsmaður frá John Wood Group segði í hosdagin, at felagið hevði sent havnastýrinum skriv, har sagt var frá, at felagið hevði áhuga í hvat fer at henda í Scrabster. Sum alið taka feløg í oljuídnaðinum ikki munnin ov fullan og mælti áðurnevndi talsmaður til varsemi, tí eingin kann vita hvat fer at henda um nøkur ár.

Stjórin í havnastýrinum í Scrabster, Ronnie Sampson, segði eisini hoskvøldið, at tað kendist sera væl, at eitt av fremstu feløgunum innan tænastuveitingar til oljuvinnuna vísti so stóran áhuga, hóast ætlaninar hjá havnastýrinum enn bert finnast á pappírinum. Hetta, sigur harra Sampson, vísir at feløg gjølla fylgja við í hvat fyriferst í Scrabster.

Hesin supplybáturin er til arbeiðis stutt frá føroysku markinum. Mynd BP

Oljuarbeiðsmenn her við at bora eftir olju vestan fyri Hetland. Mynd BP